## Ronaldinho til USA



Sambært spanska blaðnum, El Mundo Deportivo, hevur La Galaxy boðið Barcelona á leið 200 milliónir krónur fyri brasilska Ronaldinho. 28 ára gamli spælarin, sum áður er kosin heimsins besti, sigst hava fingið loyvi frá Barcelona at samráðast við onnur feløg, og eitt nú hava Milan, Chelsea og Manchester City verið nevnd sum møguligir komandi arbeiðsgevarar. Sambært spanska blaðnum, so er tilboðið úr USA tó somikið stórt, at tað verður trupult at siga nei takk til. Millum annað skal árslønin liggja um tær 250 milliónirnar.

## Nú kunnu feløgini skifta spælarar

Síðani síðst í februar hava liðini í fremstu føroysku fótbóltsdeildunum ikki kunnað fingið sær nýggjar spælarar. Orsøkin er sonevnda flytingarvindeygað, sum lat aftur í februar. Í dag letur vindeygað uppaftur, og fram til endan av juli mánaði kunnu føroysku feløgini aftur fáa nýggjar spælarar til síni lið. Onkur skifti eru á veg. Millum annað frættist úr Klaksvík, at KÍ skal styrkja seg við HB-miðvallaranum Emil Leifsson og amerikanska álopsspælaranum Joe Zewe. Søgur ganga eisini um onnur feløg, sum skulu hava nýggjar spælarar, og meira verður ivaleyst at frætta um tað komandi tíðina.

# Fáa lítið burturúr á útivølli

**Innanhýsis uppgerðirnar millum tey fýra fremstu enda sum oftast við heimasigrum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru tey fýra, ið myndað oddin, sum tað undan kappingarbyrjan varð roknað við skuldi gera tað. VB/Sumba, 07 Vestur, TB og AB eru tey einastu, sum hava møguleika at flyta upp í Formula deildina, og tað eru hesi fýra, sum eru á fýra teimum ovastu plássunum.

AB hevur leingi verið millum trý tey bestu, men eftir túrin suður á Sevmýri datt AB niður á fjórða plássið. Orsøkin er tann, at TB við at skora 2-1 sigursmálið í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat, leyp um bukk upp um júst AB.

Útivøllar hagtølini eru soltin hjá AB, tá ið argjamenn hava spælt ímóti kappingarneytunum til uppflyting. AB hevur tapt 4-3 í Vágum, 1-0 í Vági og í gjár 2-1 á Tvøroyri.

Merkisvert er tað, at tey bæði Suðuroyar liðini bara hava spælt eina ferð í part á útivølli ímóti teimum, sum kappast um uppflyting, meðan AB og 07 Vestur hava spælt tríggjar ferðir í part á útivølli ímóti kappingarneytunum.

Eisini hjá 07 Vestur hava ferðirnar til Suðuroyar hilnast illa. 07 Vestur tapti 4-0 á Sevmýri, og á Vágseiði taptu teir 1-0. Meðan AB tapti í Sørvági, og eydnaðist tað 07 Vestur at fáa stig á Argjum, har úrslitið var 2-2. Einasti útisigurin í toppuppgerðum higartil var tað, tá ið VB/Sumba vann 2-0 á Sevmýri.

At Suðuroyarliðini bara hava hittkappingarneytarnar eina ferð í part á útivølli, meðan AB og 07 Vestur hava vitjað tey, sum tað verður kappast við um uppflyting, tríggjar ferðir, hevur ivaleyst sítt árin á, at støðutalvan sær út soleiðis, sum hon ger.

Innanhýsis uppgerðirnar ímillum hesi fýra eru lyklauppgerðir. Leygardagin fara øll hesi fýra at spæla á útivølli, og tískil verður talan ikki um nakra innanhýsis uppgerð.

Tann fyrsta av tí slagnum, sum stendur fyri framman, verður, tá ið AB leygardagin 28. juni í 13. umfari fer at fáa vitjan av oddaliðnum VB/Sumba. 5. juli fer TB at vitja í Sørvági, og 12. juli, tá ið síðsta umfarið undan summarsteðginum verður á skránni, fer VB/Sumba at spæla í Sørvági.

Hjá teimum, sum ætla sær at flyta upp, eru ikki ráð at klossa fleiri stig burtur ímóti eykamonnunum hjá Formula liðunum. AB og 07 Vestur hava higartil fingið fult ímóti eykaliðunum, meðan tey bæði feløgini úr Suðuroy longu hava mist. Víkingur hevur í Leirvík vunnið 1-0 á bæði VB/Sumba og TB, og HB hevur megnað javnleik bæði á Sevmýri og á Vágseiði. Á Tvøroyri var úrslitið 2-2, og leygardagin endaði tað málleyst í Vági.

Merkisvert í hesi vikuni var tað, at NSÍ, sum eftir síðsta vikuskifti hevði fýra stig og var aftast, nú hevur tvífaldað úrtøkuna. Mikukvøldið endaði tað 1-1, tá ið HB vitjaði við Løkin, og fríggjakvøldið endaði tað 5-0, tá ið EB/Streymur – ivaleyst í stevnutonkum og finalutonkum – vitjaði á sama vølli.

Nú er B68 aftast. Grannadystur millum B68 og NSÍ verður á Svangaskarði 28. juni.



*Tað gjørdust Óli Johannesen og TB, sum drógu longra stráðið í uppgerðini móti Allan Mørkøre og AB*
*Mynd: Talgilt*

### FAKTA um 1. deild

**Mikukvøldið**
**NSÍ-HB 1-1 (1-0)**
**1-0:** Kári Hansen
**1-1:** Torkil Kollsker
**Reytt kort:** Poul Thomas Dam 75. (2 gul)

**Fríggjakvøldið**
**NSÍ-EB/Streymur 5-0 (5-0)**
**1-0:** Sonni L. Petersen
**2-0:** Sonni L. Petersen
**3-0:** Sjálvmál
**4-0:** Jann Martin Mortensen
**5-0:** Kári Hansen

**Leygardagin**
**VB/Sumba-HB 0-0**

**Sunnudagin**
**07 Vestur-B68 8-2 (2-1)**
**1-0:** Jens Erik Rasmussen 17.
**2-0:** Jóan Petur á Stongum
**2-1:** Jonleif Højgaard br
**2-2:** Emil Olsen
**3-2:** Andrzej Stretovicz 52.
**4-2:** Ingi Ole-Jacobsen 52.
**5-2:** Kim Poulsen 56.
**6-2:** Tór-Ingar Akselsen 56.
**7-2:** Tór-Ingar Akselsen 78.
**8-2:** Kim Poulsen 80.

**TB-AB 2-1 (1-0)**
**1-0:** Bárður Dimon 42.
**1-1:** Rógvi Holm 52.
**2-1:** Bárður Dimon 90.

**Víkingur-KÍ 5-2 (3-1)**
**0-1:** Álvur F. Christiansen
**1-1:** Bárður Hansen
**2-1:** Bárður Hansen
**3-1:** Finnur Justinussen
**4-1:** Per Jacobsen
**5-1:** Finnur Justinussen
**5-2:** Leon Bjartalíð

### Kanska brotssparkskapping í kvøld

Í kvøld kl. 19.45 spæla Italia-Frakland og Rumenia-Holland, og tað einasta, sum er víst undan hesum, er, at Holland kemur víðari. Holland hevur 6 stig, Rumenia hevur 2 stig, og fyrrverandi Heims- og Evropameistarnir, Italia og Frakland hava 1 stig. Vinnur Rumenia á Hollandi eru teir púra vísir í, at teir hava vunnið seg í fjórðingsfinaluna. Spæla Italia og Frakland javnleik, so sleppur Rumenia til fjórðingsfinaluna við einum javnleiki ímóti Hollandi. Vinnur annar av Italia og Fraklandi, og Rumenia ikki fær meir enn 1 stig, so er Rumenia úti. Um Italia og Frakland spæla javnleik 1-1, 2-2 ella 3-3, og Rumenia tapir - óansæð um tað er lítið ella stórt - so er Italia í fjórðingsfinaluni, sjálvt um bæði Rumenia, Frakland og Italia øll hava 2 stig tá. Tí tá hevur Italia skorað flest mál í dystunum ímillum hesi trý londini. Frakland-Rumenia 0-0 og Italia-Rumenia 1-1 elvir til hesa støðu. Tá telur ikki, at ein tapir minni ímóti Hollandi, enn hini bæði londini. Frakland tapti 1-4, og Italia tapti 0-3 ímóti Hollandi. Og forvirringin endar ikki her. Italia og Frakland hava bæði málmunin 1-4 og 1 stig. Spæla Italia og Frakland javnleik, og Rumenia fær stig, so mugu Italia og Frakland út í eina brotssparkskapping, sjálvt um hvørgin av teimum tá kemur í fjórðingsfinaluna. Hetta verður gjørt fyri at staðfesta hvør verður nr. 3 og 4 í bólkinum. Tað skal brúkast til seedingar og styrkismetingar í framtíðar kappingum. Óansæð, tað verður stuttligt at fylgja við í kvøld. Italski venjarin, Roberto Donadoni er vísur í, at vinurin Marco van Basten fer at syrgja fyri hollendskum sigri í kvøld.
-HS